ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

26. januar 2022
Mál: 22/01059
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BS

Nr. 52-111/2021

Svar uppá § 52a fyrispurning nr. 52-111/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø - Starvsfólkatrot á vælferðarøkinum

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

Spurningar:

1. Hvørji átøk metir landsstýrismaðurin hava størst týdning fyri at bøta um starvsfólkatrotið?
2. Hvat heldur landsstýrismaðurin um, at tað verður sett serlig pulja av til at hækka tær lægstu lønirnar (sum er partur av løgtingsmáli nr. 18/2021)?
3. Hvussu ávirkar starvsfólkatrotið tænasturnar hjá Almannaverkinum í løtuni?

Svar:

1. **Hvørji átøk metir landsstýrismaðurin hava størst týdning fyri at bøta um starvsfólkatrotið?**

   Landsstýrið arbeiðir í løtuni við at fáa lýst og greinað hvussu starvsfólkatørvurin innan vælferðarøkini komandi 10 árini kann verða nøktaður, og hvat fyri átøk mælt verður til at seta í verk. Í hesum arbeiðinum luttaka umboð fyri avvarðandi aðalráð, stovnar og kommunur. Væntandi verður arbeiðið liðugt í næstum.

   Landsstýrismaðurin vil ikki taka endaliga støðu til málið, fyrr enn landsstýrið hevur viðgjørt málið**.**

2. **Hvat heldur landsstýrismaðurin um, at tað verður sett serlig pulja av til at hækka tær lægstu lønirnar (sum er partur av løgtingsmáli nr. 18/2021)?**

   Víst verður til svar, undir spurningi 1.

3. Hvussu ávirkar starvsfólkatrotið tænasturnar hjá Almannaverkinum í løtuni?

Starvsfólkatrotið hevur við sær, at tað eru borgarar, sum eru málsviðgjørdir og skulu hava tænastu, sum fara á bíðilista, ella kunnu ikki fáa viðkomandi tænastu.

Somuleiðis er talan um, at tænastustøðið og fakliga dygdin í førum lækkar, tí Almannaverkið ikki fær fakfólk til tænasturnar, stovnar eru undirmannaðir o.t.

Tórshavn, 26. januar 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður